VERKAFÓLK

Tórshavn 03.10.2025

Hoyringssvar til lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um eftirløn
Í stuttum kann sigast, at talan um jaligar broytingar, sum feløgini mæla til at fremja, og lógin gerst greiðari á nøkrum økjum, eins og víst verður á í viðmerkingunum.

Serliga eru tað viðurskiftini, sum snúgva seg um at avtaka 60 mánaða undantakið til egna eftirlønaruppsparing, sum útlendingar í tíðaravmarkaðum starvi í Føroyum hava í løtuni. Hesar ásetingar hava gjørt stórar avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum, og fyrisitið hevur heldur ikki verið í mun til kravið um, at starvið er tíðaravmarkið í upp til 60 mánaðir, sum lógin annars fyriskrivar. Teir útlendingar, sum vera verandi í Føroyum og náa eftirlønaraldur fara tískil at hava munandi verri uppsparing, og tað rættar hetta uppskotið.

Rættast er at javnseta løntakarar á arbeiðsmarknaðinum í mun til eftirløn, eins og lagt er upp til í hesum uppskoti. Feløgini taka eisini undir við, at fólk, sum flyta varandi av landinum skulu sleppa at hava pensjónina við sær. Mælt verður tó til, at kemur persónur aftur til landið, sum hevur fingið pensjón útgoldið, og vinnur sær meir pensjón, so skal hesin ikki sleppa at taka hana við sær á øðrum sinni, fyrr enn 10 ár eru liðin eftir næstu flytingina í annað land.

Sum heild hava feløgini ikki viðmerkingar til aðrar ásetingar í lógini.

Vegna Verkafólk,

Georg F. Hansen, formaður í Føroya Arbeiðarafelag
Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag
Ruth Boetius, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag
Heri Reynheim, formaður í Havnar Arbeiðarafelag
Jastrid W. Niclasen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Absalon Hansen, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag